# Toppdystir fyri framman

**Fuglfirðingarnir kunnu gerast teir fyrstu, sum taka stig frá monnunum hjá Mjølni, og í kvinnudeildini skulu TB og KÍF dystast um, hvør skal fylgja við Klaksvíkini**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Kvinnurnar hjá KÍF tóku øll á bóli fyrstu umførini, ta´tær millum annað vunnu heimadystin á TB. Men síðani er stígur komin í, og leygardagin hava tær trupla uppgávu í Trongisvági*

Talan verður um tveir sannar toppdystir, tá flogbólturin verður blástur ígongd leygardagin.

Serstakliga í kvinnudeildini hevur talan higartil verið um eina framúr spennandi kapping, og undan vikuskiftinum eru trý lið, sum eru ájøvn í oddinum við átta stigum í part.

Leygarkvøldið verða hesi tó bert tvey, tí í Trongisvági verður bara ein vinnari, tá TB tekur ímóti KÍF. KÍF tók annars alt á bóli fyrstu umførini, tá tær millum annað vunnu tryggan heimasigur á TB, men síðani er stígur tó komin í hjá teimum. Spurningurin er so, hvørt tær eru førar fyri at reisa seg í Trongisvági, har TB aloftast hevur eina sterka áskoðarafjøld aftan fyri seg. Og so skal heldur ikki gloymast, at TB hevur eitt av sterkastu liðunum í deildini.

Sama dag skulu tær hjá Mjølni taka ímóti ÍF, og í nógvar mátar tykist tað, sum um heimaliðið her fer at halda fast um oddasessin. ÍF hevur ikki somu styrki, sum liðið hevði í fjør, tá talan gjørdist um gullmerki, og Mjølnir tykist hinvegin vera komið rættiliga ígongd, eftir at tær annars høvdu nøkur trupul fyrstu umfør.

Tann trupulleikan hava menninir í Klaksvík ikki havt. Hóast talan í fleiri førum hevur verið um tættar dystir, so eiga teir í Mjølni enn fyrsta tapta settið til góðar, og í so máta eru teir greiðir favorittar undan heimadystinum móti ÍF. Skala nakar taka Mjølnir, so eru fuglfirðingarnir tó helst eitt av bestu boðunum, og so er spurningurin, hvørt teir við einum sigri kunnu leggja seg á odda í deildini, ella um Mjølnir hinvegin skal skapa sær enn størri fjarstøðu.

Tað vóna tey helst ikki í Sørvági, har SÍ eisini hevur ætlanir um at vera við í oddinum. Teir spæla hesaferð móti Fleyr, og tað líkist á pappírinum einum tryggum heimasigri. Enn hevur Fleyr ikki megnað at vunnið sær nakað stig, og at síggja til man Sørvágur vera eitt tað truplasta staðið at venda hesi gongdini.

## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**
**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 22.11 | 14.30 | VB-Søljan |
| 23.11 | 14.30 | Neistin-VÍF |
| 23.11 | 14.30 | StÍF-Kyndil |

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 23.11 | 16.00 | Neistin-VÍF |
| 23.11 | 16.00 | H71-KÍF |
| 23.11 | 16.00 | StÍF-Kyndil |

**Flogbóltur**
**Meistaradeild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 22.11 | 15.00 | TB-KÍF |
| 22.11 | 14.00 | Mjølnir-ÍF |

**Meistaradeild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 22.11 | 16.00 | SÍ-Fleyr |
| 22.11 | 16.00 | Mjølnir-ÍF |

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 TB | 6 | 4 | - | 2 | 15 | 6 | 9 | 8 |
| 2 Mjølnir | 6 | 4 | - | 2 | 13 | 8 | 5 | 8 |
| 3 KÍF | 6 | 4 | - | 2 | 13 | 11 | 2 | 8 |
| 4 Dráttur | 6 | 3 | - | 3 | 13 | 12 | 1 | 6 |
| 5 ÍF | 5 | 2 | - | 3 | 7 | 9 | -2 | 4 |
| 6 Fleyr | 7 | 1 | - | 6 | 5 | 20 | -15 | 2 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 4 | 4 | - | 0 | 12 | 0 | 12 | 8 |
| 2 ÍF | 5 | 4 | - | 1 | 12 | 5 | 7 | 8 |
| 3 SÍ | 5 | 3 | - | 2 | 11 | 8 | 3 | 6 |
| 4 Fram | 5 | 1 | - | 4 | 5 | 13 | -8 | 2 |
| 5 Fleyr | 5 | 0 | - | 5 | 1 | 15 | -14 | 0 |

# Føroyar nummar 127

**Seinastu ellivu mánaðirnar eru Føroyar skramblaðar 14 pláss niður eftir FIFA-styrkislistanum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Á altjóða styrkislistanum hjá FIFA, eru Føroyar á seinastu útgávuni heilt aftur á 127. plássinum, og tað er langt síðani, at vit hava verið stødd somikið niðarliga.

Síðani seinasta ársskiftið eru Føroyar dotnar 14 pláss niður eftir listanum, og skal metast eftir lopunum, sum aðrar fótbóltstjóðir hava hug at gera í løtuni, so eru stór sannlíkindini fyri, at Føroyar fara enn longur niður á listanum.

Ein slíkur listi vil tó altíð vera upplagt kjakevni, tí hóast FIFA nýtir støddfrøðiligar snildir av ymsum slag, til tess at geva ymsu fótboltstjóðunum ratingstig, so man tað bert vera í dystum landanna millum, at ein ítøklig meting av styrkini kann gerast.

Til stuttleikar kann nevnast, at síðani januar mánað hava eitt nú Panama, Benin, Mauritius, Turkmenistan, Lesotho, Sswaziland, Botswana og Libanon yvirhálað Føroyar á listanum. Hinvegin halda vit okkum framvegis frammanfyri lond sum Indiu, Mozambique, Tahiti, Yemen, Etiopia, Palestina og Sierra Leona, so kanska kundi tað verið eitt hugskot at leikt venjingardyst móti onkrari av hesum tjóðum.

Fremstu londini á listanum og støðan hjá norðanlondum framgongur av listanum niðanfyri. Tølini í klombrum eru styrkismetanin hjá liðnum við ársbyrjan.

| | |
|---|---|
| 1 | Brasil (1) |
| 2 | Frakland (2) |
| 3 | Spania (3) |
| 4 | Argentina (5) |
| 5 | Mexico (8) |
| 6 | Holland (6) |
| 7 | Turkaland (9) |
| 8 | Ongland (7) |
| 9 | Týskland (4) |
| 10 | Kekkia (15) |
| 13 | Danmark (12) |
| 17 | Svøríki (24) |
| 39 | Noreg (26) |
| 42 | Finnland (43) |
| 60 | Ísland (58) |
| 127 | Føroyar (113) |






Vit gera gravarstaðin kláran til várið
Vit seta várleykir niður
Vit pynta gravarstaðin
við granni til jólar
Eisini seta vit ljós upp
til jólar og nýggjárs

**Ring í góðari tíð**

**Gravstaðar - røktin**
v/ Vagn Jákupsson í Geil
Tel: 226270
vg@post.olivant.fo
www.gravstadarroktin.fo



## Frisørsalong í miðbýnum í Havn
**til sølu um hóskandi boð fæst**

Salongin er væl útgjørd og liggur væl fyri við góðum parkeringsmøguleikum. Eisini kann heilsøluumboð fylgja við í søluni.

Skriva til:
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn
Bill. mrk. 20.11.



## Suðringar!

Vit sýna fram tilfar og mynstur til tann føroyska búnan á
**Hotel Tvøroyri leygardagin 22. november frá kl. 10.00–17.00.**

Í hesum sambandi er handilin í Tórshavn stongdur.

**Hondarbeiðsbúðin**
Dr. Jakobsensgøta 5
100 Tórshavn
Tlf. 310925



## Starvsfólk

Søkt verður eftir tilkomnum fólki til handilin at byrja skjótast gjørligt.

Arbeitt verður í skiftivaktum.

Meira fæst at vita við at ringja á tlf. 444388 ella 214571 og tosa við Maritu.

BREYÐMOLIN



*Eg havi keypt køk frá Balslev.*
*Takk fyri góða tænastu og góðsku.*

**Pætur Debes, Gjógv**



## m/s Vesturfarið til sølu

Um hóskandi boð fæst, verður m/s Vesturfarið selt.

Talan er um skip, sum nú hevur loyvi til, innan fyri eitt dagatal uppá 132 fiskidagar, at reka línuveiðu á innaru fiskidagaleiðum á føroysku landleiðunum og innan fyri eitt dagatal uppá 51 fiskidagar at reka línuveiðu á Føroya Banka.

Eyka skrúvubløð fylgja við.

Skipið er í bólki 4A.

Áhugað kunnu venda sær til

**Advokatfelagið við Strond 4**
Yviri við Strond 4
Postboks 359
FO-110 Tórshavn



## Klinikkassistentur

Í sambandi við burðarfarloyvi søkja vit eftir **avloysara fyri klinikkassistent at byrja mánadagin 5. januar 2004.**

Talan er um fulltíðarstarv.

Umsøkjarar við útbúgving hava fyrimun.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 30. november 2003.

**Tannlæknastovan hjá Unnur Jensen**
Varðagøta 26
Box 3142
110 Tórshavn



**Peugeot 306, HDI**



- Árgangur: oktobur 1999.
- Koyrt: 68.000 km
- Motorur: TurboDiesel, 2 litur HDI
- Litur: myrkagrønt metallakk
- Eykaútgerð: Alufelgur (umfrant vanligu felgurnar) og bakspoilara.
- Nýtir diesel og er sera bíligur í rakstri.

Til sølu um hóskandi boð fæst.

Meira kann fást at vita á **telefon 551503**



## Leiðari til sambýli fyri sinnisveik

Starv sum leiðari til sambýlið í Sandavági verður hervið lýst leyst til setan skjótast gjørligt ella eftir nærri avtalu. Talan er um nýtt starv, sum tann setti skal vera við til at mynda.

Sambýlið í Sandavági, sum er undir uppbyggjan, er eitt heim fyri sinnisveik, har 5 fólk kunnu búgva.

**Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:**
- hug og hegni at arbeiða sjálvstøðugt
- skapa innihald og tryggleika í dagligdegnum
- hava skipaðan gerandisdag so brúkarin mennist.

Herumframt hevur leiðarin fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av sambýlinum.

**Førleikakrøv:**
- viðkomandi útbúgving
- fyrimunur er at hava leiðslu- og fyrisitingarligar royndir
- hollar starvsroyndir innan tað psykiatriska økið
- evni og áræði at ganga nýggjar leiðir
- góð samskiftisevni
- dugir væl við fólki

**Løn- og setanarviðurskifti:**
Løn- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at hetta kann verða umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Heimarøktina og Serforsorgina á telefon 304020 og tosa við Mary J. í Garði, stjóra.

**Umsóknarfreist:** mánadagin 1. desember 2003.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn, við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu sendast til:

**Heimarøktina og Serforsorgina**
att.: Mary J. í Garði, stjóri
Eirargarður 2, 2. hædd
FO-100 Tórshavn



## FØROYSK ORÐABÓK
## Móðurmálsorðabókin

Nú ber til at ogna sær innbundin eintøk av Føroyskari orðabók í einum bindi.

Prísurin er tann sami, sum hefta útgávan hevur kostað: 450 kr.

Samstundis er prísurin á heftu útgávuni lækkaður til 375 kr.

Enn fæst Føroysk orðabók eisini á fløgu. Prísur: 340 kr. eintakið.

Spyrjið eftir Føroyskari orðabók í bókabúðunum. - Eitt hent amboð at eiga.

**Føroya Fróðskaparfelag**